# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Føðingar

9. apríl fingu Marilyn Hansen og Búgvi Poulsen í Horsens ein son. Hann var 49 cm langur og vigaði 3257 gr.

19. apríl fingu Mirjam og Kári Vitalis, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3550 gr.

23. apríl fingu Jóna og Jákup Pauli Danielsen, Trongisvági, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3960 gr.

23. apríl fingu Súsanna Jacobsen og Hávarður í Stórustovu, Argjum, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3685 gr.

24. apríl fingu Maja Højsted og Danny O. Højsted, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3610 gr.

24. apríl fingu Sissal Rasmussen og Jákup Sørensen, Tórshavn, ein son. Hann var 51 cm langur og vigaði 3125 gr.

24. apríl fingu Maria og Hans Jákup Jacobsen, Miðvági, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3450 gr.

25. apríl fingu Hanna og Hilmar Sam Lamhauge, Glyvrum, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3100 gr.

25. apríl fingu Karina og Andrzej Stretowicz, Sandavági, eina dóttur. Hon var 57 cm long og vigaði 3900 gr.

26. apríl fingu Anja Salberg Olsen, Kollafirði, og Høgni Christiansen, Vestmanna, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 4070 gr.

26. apríl fingu Nathalia og Anfinn Isaksen, Klaksvík, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3250 gr.

27. apríl fingu Ann Gvødny og Johannes Ólavsson, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3400 gr.

28. apríl fingu Winnie Delmarsdóttir og Søren Poulsen, Hoyvík, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3330 gr.

29. apríl fingu Randi Sólsker og Sigfríður Abrahamsen, Eiði, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 3950 gr.

29. apríl fingu Hervør og Ove Heinesen, Bø, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 2800 gr.

29. apríl fingu Rúna Egholm, Kvívík, og Temel Yildiz, Horsens, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3100 gr.

29. apríl fingu Vónbjørt Berg og Kári Streymoy, Glyvrum, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3235 gr.

1. mai fingu Astrid Joensen og Ólavur Christiansen, Fuglafirði, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3550 gr.

## Til minnis um Torvald

Tann 18. apríl andaðist Torvald Joensen í Norðragøtu 82 ára gamal. Hetta var kanska ikki heilt óvæntað, tí heilsan hevur verið nakað svikalig seinastu tíðina. Men annars hevur hann virkað sera bragdligur fram til fyri kortum.

Torvald var norðragøtumaður í báðar ættir. Hann var sonur Onnu Jovinu, ættað av Brúnni og Zacharias Karl, ættaður úr Frammistovu. Teir vóru fimm brøður, sum komu til: Andreas Petur, Sámal Jákup, Hendrik og Frits. Torvald var yngstur, og hann er tann seinasti, sum er farin.

Torvald var sera hegnigur, og sum ungur fór hann til Klaksvíkar í smiðjulæru. Men hugurin til sjógvin hevur verið ov stórur, so hann fór til skips. Hann kom at sigla í mong ár, eisini sum motorpassari.

Millum annað var hann fleiri ár í Íslandi í 50-unum, sum nógvir føroyingar gjørdu tá. Hetta var í teirri tíðini, tá ið okkara skipafloti var í ringum standi, og føroyskir fiskimenn í hundrað og enntá í túsundtali fóru við íslendskum fiskiskipum.

Seinni í 50-unum fór hann við sluppini Báran, sum svágur hansara Eivind hjá Havna Jákup var reiðari á. Vit skuldu havt verið saman, hann sum motorpassari, tá ið eg sjálvur fór til skips fyri júst 50 árum síðani við Báruni, men tá var hann sjúkur. Seinni komu vit at sigla saman, og havi eg bert góð minnir um Torvald.


*Torvald og Ragna á gullbrúðardegnum*

Torvald giftist 3. desember 1955 við Ragnu, dóttir Magdalenu og Tummas Jakku á Geilabø. Thorvald og Ragna bygdu beint við húsini á Geilabø og komu vit tí at búgva í sama grannlagi. Tí sóust vit eisini javnan og fingu hvørja ferð eitt prát. Torvald var vitugur og fyrikomandi og altíð við tí góða orðinum. Seinastu ferð vit hittust var bert fyri vikum síðani. Tað verður ein saknur ikki longur at hitta Torvald í túninum.

Sigast kann, at grannalagið hevur verið gott. Hetta er eisini Ragnu við hennara milda og trúfasta sinnalagi fyri at takka.

Í mong ár koyrdi Torvald rutukoyring. Í veruleikanum var tað lættari at ferðast millum Havn og Gøtu tá enn nú. Ringt varð til nr. 66, og so var ein heintaður í túninum og koyrdur út á Toftir, haðani tað bert tók ein hálvan tíma til Havnar við Tróndi og Dúgvuni, sum vóru munandi hugaligari at ferðast við enn einum bussi. Tað sama var heim aftur, og ein varð settur av í túninum. Í dag verða ferðafólk við bussinum sett av langt inni í Gøtudali! Torvald koyrdi eisini í fleiri ár við skúlabørnum til Fuglafjarðar.

Torvald kom at arbeiða á fiskavirkinum í Gøtu, og her var eisini brúk fyri hansara hegni. Maskinmaður var hann jú góður. Á virkinum arbeiddi Torvald til hann var 75 ára gamal.

Torvald fer ikki í gloymskuna. Hann hevur verið við til at skipa fyri einum "undirhúsi" í Norðragøtu. Hetta fekk navnið Torvalds Kaffi sum viðurkenning til Torvald fyri allar kaffimunnarnar, hann hevði gjørt á Fiskavirkinum, tá menn sunnumorgnar leitaðu inn hagar, tá Torvald fór at hyggja maskinarínum fyri at tryggja sær, at alt var í lagi í arbeiðstíð mánadag.

Kaffi gjørdi hann framvegis í nýggja undirhúsinum, har nógvir størri og smærri "heimstrupulleikar" hava verið loystir. Men Torvald verður eisini minstur fyri tað hann var. Ein álitismaður í odd og egg.

Sum aðrir gøtumenn hevði Torvald stóran áhuga fyri fótbólti. Hetta gav honum eitt serligt álitisstarv, og tað var at passa fløggini hjá GÍ. Var nakað á vási, syrgiligt ella gleðiligt, var tað Torvald, sum vant fløggini á stong og tók tey niður aftur.

Alt hetta virksemi gjørdi, at Torvald kendi nógv fólk, og hetta kom eisini til sjóndar hendan dagin, hann fór til gravar. Kirkjan var full, og tað er sjáldan, at tað hevur verið so stórt fylgi í kirkjugarðinum.

Thorvald og Ragna fngu fýra børn, Snorri, Tollakur, Álvur og Marjun. Synirnir búgva allir í Norðragøtu og Marjun í Fuglafirði, so tey hava havt øll børnini um seg. Tað eru fleiri barnabørn, og Torvald náddi júst ikki at gerast langabbi.

Vit eru mong, sum koma at minnast Torvald við takklæti.

**ó.**

## Bygningssnikkarar fingið prógv



Mikudagin 30 apríl fingu fýra bygningssnikkarar prógv á Tekniska Skúlanum í Havn.

**Teir eru f.v.:** Andras T.M. Davidsen, Vatnsoyrar, Fríði Johan Jacobsen, Tórshavn, Janus Brix Kamban, Tórshavn, og Karl Åge Hansen, Tórshavn.

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Sosialurin
www.sosialurin.fo